# Fitti Kurt verður óreinur




**Tað kann henda fyri tann besta, og tað hendi eisini Kurt. Onnur barnabókin um Kurt er komin í bókabúðirnar**

ÚTGÁVA
*Turið Kjølbro*

Vit hildu øll hann vera so fittan, men nú hann verður miljóningur í barnabókini Kurt verður óreinur, verður hann ikki bara pírin og nasvísur, men ógvuliga óreinur, eisini við síni næstu. Kurt fær nógvar pengar um hendi, tá ið hann ein dagin bjargar einum sjómanni frá at drukna. Hesin gevur honum ein diamant, sum Kurt síðani selur. Alt endavendist heima hjá Kurt og teimum.

Kurt verður óreinur er onnur bókin um Kurt. Í juni var Kurt fyrstu ferð á skránni, tá ið Bókadeild Føroya Lærarafelags gav út bókina, Kurt og fiskurin. Tá lærdu vit eisini alt húskið at kenna, konuna Onnu Lisu og børnini Klænu-Helenu, Sodavatns-Kurt og lítla Bud. Saman fóru tey eina ferð um alla verðina í trukkinum hjá Kurt.

Bøkurnar um Kurt eru stuttligar, og har ber alt til. Og hóast Kurt ber seg skilaleyst at, tá ið hann ikki megnar at standa ímóti freistingunum, so eru persónarnir góðvarnir á ein barnsligan hátt. Tað er sonn fragd at lesa hesar barnabøkurnar eftir Erlend Loe, sum er millum fremstu høvundar í Noregi í dag.

Juli Fagerland týddi bókina úr norskum.

Kurt verður óreinur er 114 bls., heft og kostar kr. 90 í bókabúðunum. Bókin er umbrotin og prentað á Hestprent.

Stríðið um skúlan á Trøllanesi:

# Embætissjusk hóttir landsstýrismann

**Nógv kundu bent á, at Mentamálastýrið við vilja hevur fjalt týðandi skjal fyri fjølmiðlunum. Mentamálastýrið sigur, at skjalið ikki kom fram, tí tað var skeivt journaliserað. Sosialurin hevur tosað við fólk við innliti í almennu journaliskipanirnar, sum siga hetta vera lítið sannlíkt**

SKJAL
*John Johannessen*



*Sambært keldum í almennu umsitingini skuldi tað borið illa til hjá Mentamálastýrinum at journalisera skjalið um skúlan á Trøllanesi so skeivt, at tað ikki fanst, tá leitað varð í málinum um skúlatrætuna á Trøllanesi. Er skjalið goymt við vilja, er hetta tyngjandi fyri landsstýrismannin, staðfestir løgfrøðingur*

Tað er nógv, sum kundi bent á, at Mentamálastýrið við vilja hevur fjalt brævið frá Óla Holm, landsstýrismanni til Mikladals Kommunu, har hann gevur boð um at lata skúlan á Trøllanesi upp aftur.

Hetta brævið er eitt avgerandi skjal í málinum um skúlan á Trøllanesi, tí tað prógvar, at landsstýrismaðurin fór út um sínar heimildir.

## Miðlarnir avdúkaðu

Tveir miðlar, Útvarpið og Dimmalætting, bóðu við heimild í lógini Mentamálastýrið, um at fáa útflýggjað øll skjøl í málinum um trætuna um skúlan á Trøllanesi. Men tá tað til kom til stykkis, vantaði týdningarmiklasta skjalið bæði í skjaladunganum, sum Útvarpið fekk, og í skjaladunganum, sum Dimmalætting fekk útflýggjaðan frá Mentamálastýrinum.

Men miðlarnir vistu, at skjalið fanst og fingu tað til vega uttan um Mentamálastýrið. Og tískil fingu tey prógvað, at landsstýrismaðurin við menta- og skúlamálum, Óli Holm, greitt fór út um sínar heimildir, tá hann gav skrivlig boð um, at skúlin á Trøllanesi skal lata upp.

## Skeivt journaliserað

Tað tykist sjálvsagt ógvuliga løgi, at júst hetta skjalið ikki fanst í málinum um skúlatrætuna á Trøllanesi, sum miðlarnir bóðu um innlit í.

Hetta hava Útvarpið og Dimmalætting eisini í felag gjørt vart við.

Mentamálastýrið svarar, at hetta er eitt óheppið mistak. Boðini eru, at brævið av misgávum er skeivt journaliserað.

Men, sum Sosialurin skilir, eru journalskipanirnar í almennu fyrisitingini soleiðis háttaðar, at hetta er lítið sannlíkt. Sosialurin hevur tosað við fleiri fólk í almennu fyrisitingini, sum hava skil fyri journalisering. Og hesi siga tað vera vanliga mannagongd at gera krossaðar ávísingar til hvørt einstakt skjal, so tað eisini vísir til onnur mál, sum tað ikki er journaliserað undir, men sum tað kortini hevur samband við.

Eisini er vanligt at journalisera skjøl undir fleiri málum, um nakar ivi er um, júst hvat mál, ið skjalið hoyrir til.

Harumframt ger journalskipanin av sær sjálvum leitiorð til hvørt einstakt skjal, tá journaliserað verður. Tí átti skjalið at verið komið fram, um leitað varð uppá Trøllanes til dømis. Og oman á tað heila skrásetir skipanin eisini sendaran av skjalinum og nær tað er sent. Tí ber eisini til at leita upp á Óla Holm.

Tað skuldi tí borið illa til hjá Mentamálastýrinum at journalisera skjalið so skeivt, at tað ikki fanst, tá leitað varð í málinum um skúlatrætuna á Trøllanesi.

## Goymdi einki

Óli Holm, landsstýrismaðurur, er ógvuliga keddur um støðuna, sum er íkomin. Hann sigur, at hann aldri kundi funnið uppá at goymt eitt skjal fyri almenninginum, soleiðis sum tað kann tykjast.

Landsstýrismaðurin sigur seg av góðum grundum einki kenna til journalskipanina í Mentamálastýrinum, og tí góðtók hann eisini frágreiðingina um, at skjalið var skeivt journaliserað. Men eftir at hava frætt nærri um journalskipanina frá Sosialinum, fer Óli Holm at biðja um nærri frágreiðing frá embætisverkinum.

Petur Petersen, aðalstjóri í Mentamálastýrinum, bedýrar eisini, at skjalið ikki er goymt við vilja. Hann sigur, at Mentamálastýrið enn ikki er farið at nýta krossaðar ávísingar, og harafturat var tað onkur, sum var óvanur við at journalisera, sum hevði journaliserað júst hetta skrivið. Og Petur Petersen ásannar, at hetta er álvarsamt.

Sum Sosialurin skilir, hevur øll tann almenna fyrisitingin somu mannagongdir at halda seg til, tá tað snýr seg um at journalisera skjøl. Tí er tað undranarvert, at øll umsitingin, uttan Mentamálastýrið, nýtir krossaðar ávísingar.

## Hóttir landsstýrismannin

Støðan, sum er íkomin í Mentamálastýrinum er sera álvarsom. Sosialurin hevur tosað við løgfrøðing, sum beinleiðis metir landsstýrismannin vera í vanda.

– Talan er um eitt sera álvarsamt mál, um umsitingin hevur fjalt eitt skjal við vilja. Lógin um alment innlit verður tikin í størsta álvara, og tað kann fáa politiskar avleiðingar, um tað kann prógvast, at nakar hevur givið boð um, at skjalið ikki skuldi útflyggjast, sigur Anfinn V. Hansen, løgfrøðingur.

– Fjølmiðlar og almenningurin hava krav uppá at fáa øll viðkomandi skjøl, tá biðið verður um alment innlit, og skjøl, sum kunnu verða avdúkandi, skulu eisini útflyggjast, sigur hann.

Hóast nógv bendir á, at mannagongdin í Mentamálastýrinum viðvíkjandi trætuni á Trøllanesi hevur verið undranarverd, vita vit ikki, um tyngjandi skjalið í málinum er goymt við vilja.

Men vit kunnu staðfesta, at embætissjusk hóttir landsstýrismannin. Og tí er helst bert eftir at finna út av, hvør eigur ábyrgdina.



# Uppskriftin hesa vikuna

Gjestall Baby Ull

## Til gentu: Jakki, spensari og pannuband

*Dreingjasettið kemur í blaðið komandi mikudag*



| Størrelser: | | 1/2 | 4/6 | år |
|---|---|---|---|---|
| **Overvidde:** (plaggets mål) | | | | |
| Jakke: | Ca. | 67 | 80 | cm |
| Genser: | Ca. | 64 | 77 | cm |
| **Hel lengde:** | | | | |
| Jakke: | Ca. | 30 | 38 | cm |
| Genser: | Ca. | 34 | 42 | cm |
| **Ermelengde:** | Ca. | 24 | 32 | cm |
| **Skjørtelengde:** | Ca. | 26 | 35 | cm |
| **Benlengde** (nikkers): | Ca. | 16 | 24 | cm |

**MATERIALER: Gjestal Baby Ull (100% merino ull), nøster à 50 g.**
**Kan også strikkes i Gjestal Baby Courtelle (100% courtelle) og Gjestal Baby Bomull 8/4 (100% bomull).**

**PIKESETT**

| | | | |
|---|---|---|---|
| okergult nr. 822 = bunnfargen | ca. | 2 | 3 nøster |
| rødt nr. 823 = mønsterfarge 1 | ca. | 4 | 5 nøster |
| mørke grønt nr. 812 = mønsterfarge 2 | ca. | 1 | 1 nøste |
| naturhvitt nr. 800 = mønsterfarge 3 | ca. | 1 | 1 nøste |

**Pinner:** Rette p, strømpep og rundp nr. 2½ og 3.
5-6 sett hekter Art. nr. 9497 til jakken. 2 knapper Art. nr. 9480 til skjørtet.

**GUTTESETT**

| | | | |
|---|---|---|---|
| naturhvitt nr. 800 = bunnfargen | ca. | 2 | 4 nøster |
| koksgrått nr. 827 = mønsterfarge 1 | ca. | 5 | 7 nøster |
| rødt nr. 823 = mønsterfarge 2 | ca. | 1 | 1 nøste |
| okergult nr. 822 = mønsterfarge 3 | ca. | 1 | 1 nøste |

**Pinner:** Rette p, strømpep og rundp nr. 2½ og 3.
2 knapper til genser og 2 knapper til nikkers Art. nr. 9480.
Eventuelt 1 trykknapp til genserhalsen.

**Vanlige forkortelser**
M=maske, r=rett, vr=vrang, str=strikk, p=pinne, omg=omgang, vr-bord=vrangbord, glattstr=glattstrikk, rettstr=rettstrikk, vrangbordstr=vrangbordstrikk, kantm=kantmaske, arb=arbeidet, beg=begynn, forts=fortsett, sm=sammen, g=gram, bunnf=bunnfarge.

**Strikkefasthet**: 28 m glattstrikk og mønster i bredden på p nr. 3 måler 10 cm. **Husk at strikkefastheten må holdes hvis resultatet skal bli vellykket.**

**PIKESETT**
**JAKKE:** ( Str rundt og klippes opp etterpå)
**Bolen**
Legg opp181-217 m + 4 midtm (de 4 midtm er til å klippe opp i til stolper etterpå og taes ikke med i mønsteret) på p nr. 2½ med mønsterfarge 1. Str 11 omg glattstr, 1 omg vr, mønsterbord I etter diagrammet. Skift til p nr. 3. Fortsett med mønster II til hel lengde. **Men** når arb måler ca. 26-34 cm felles det for halsringning. Fell av 14-18 m midt på forstykket + de 4 midtm (klippem). Fell videre i hver side på hver 2. p mot halsen med 3,2,1 m (likt for begge størrelser). Str rett opp til arb måler ca. 30-38 cm og fell de resterende m rett av til en pen, jevn kant som ikke strammer.

**Ermene**
Legg opp 40-48 m på p nr. 2½ med mønsterfarge 1. Str kant som nede på bolen. Skift til p nr. 3 og øk samtidig jevnt fordelt ut til 52-60 m. Str mønster II etter diagrammet, (pass på slik at midten på mønsteret kommer midt på ermet. Tell ut fra midten). Samtidig økes 2 m på undersiden av ermet ca. hver 5. omg til det i alt er 82-92 m i omg og ermet måler ca. 24-32 cm. Snu arb og str 5 omg glattstr med bunnfargen til belegg. Fell løst av. Str det andre ermet likt.

**Montering, stolper og halskant**
Sy 2 maskinsømmer på hver side av midtm midt foran og klipp opp mellom sømmene. Merk av til ermehull i hver side tilsvarende vidden øverst på ermene. Sy 2 maskinsømmer rundt hvert ermehull og klipp opp mellom sømmene. Mask eller sy sm på skuldrene. Sy i ermene og sy til belegget flatt over sårkanten på vrangen.
**Stolper**
**Venstre side:** Plukk eller str opp ca. 70-90 m på p nr. 2½ med mønsterfarge 1 og str frem og tilbake mønsterbord IV etter diagrammet, 1 p r fra vrangen, 6 p glattstr. Fell av til en pen jevn kant som ikke strammer. Brett kanten dobbelt mot vrangen og sy til.
**Høyre stolpe:** Str som venstre.
**Halskant:** Plukk eller str opp 93-103 m rundt halsen på p nr. 2½ med mønsterfarge 1 og str frem og tilbake, mønsterbord IV etter diagrammet, 1 p r fra vrangen, 6 p glattstr. Fell av til en pen jevn kant. Brett kanten dobbelt mot vrangen og sy til. Fest alle løse tråder pent på vrangen. Brett inn kantene nede på bolen og ermene og sy til på vrangen. Sy i hekter.

**SKJØRT**
Legg opp 264-304 m på p nr. 2½ med mønsterfarge 1 og str rillestr frem og tilbake ( r på retten, r på vrangen.) 10 p = 5 riller. Skift til p nr. 3 og str mønsterbord V etter diagrammet, videre str glattstr med mønsterfarge 1 til arb måler ca. 23-32 cm. Str på neste omg 2 og 2 m r sm hele veien rundt = 132-152 m. Skift til p nr. 2½ og sett en merketråd midt foran og midt bak. Str rundt i vrangbordstr med 1 vridd r, 1 vr og mønsterfarge 1 ca. 3 cm. **Men** etter 1½ cm lages 2 knapphull midt bak med 12-16 m mellom knapphullene. Hvert knapphull lages ved å felle av 2 m som legges opp igjen på neste p. Sett de midterste 41-41 m midt foran på en hjelpetråd. Fell av de resterende m. Sett 8 m i hver side fra midtm på en hjelpetråd = 25-25 m igjen på p. Str med p nr. 3. mønster III etter diagrammet. Skift til p nr. 2½ og str 8 p rillestr = 4 riller og fell av.
**Seler:** Plukk opp de 8 m på hjelpetråden på p nr. 2½ og str med mønsterfarge 1 i rillestr. Str til samme lengde som smekken og sy stolpen pent til smekken. Fortsett med rillestr til selen måler fra smekken ca. 27-35 cm. Fell av. Str den andre selen lik. Sy en knapp i enden på hver sele.

**PANNEBÅND**
Legg opp 112-120 m på p nr. 3 med mønsterfarge 1. Str 9 omg glattstr, 1 omg vr, 3 omg glattstr, mønsterbord I etter diagrammet, 3 omg glattstr, 1 omg vr og 8 omg glattstr. Fell løst av. Brett kantene inn mot midten, og sy dem pent sm kant i kant.
















Tógvheilsølan
TRÁÐUR SP/F
Tlf. 312727
Sverrisgeta 19 · Postboks 181 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 31 27 27 · Fax +298 31 96 23 · Mobile +298 21 77 27
Privat: Tel +298 31 66 48